Viðmerkingar

# Mentamálaráðharrin aftur á goragangi

Góði Torbjørn, skyldmaðurin

Nú mást tú taka teg saman. Tað ber ikki til í allari framtíð at siga: Torbjørn er so nýggjur í politikki, og hann kemur uttan av víða havinum og kann sostatt ikki beinanvegin duga at brúka eina framferð, sum hóskar einum statsmanni.

Tað ber ikki til í tínum starvi at bera teg at, sum tú gjørdi m.a. í hasi greinini um formann Javnaðarflokssins eftir Dag og viku sendingina 29. september.

Nýkomin úr Smyrli svaraði Jóannes fjølmiðlagentu hjá SvF bæði væl, sakliga og púra uttan at senda nakað signal um skaðafrøi, nú óeydnismálið hjá tær sum skipara, varð sent politivaldinum.

Tíverri hendi tað enn einaferð, at onnur viðurskifti vórðu løgd í tað sagda orðið, enn tað, sum veruliga varð sagt. Hetta er tíverri eisini galdandi fjølmiðlafólkið á SvF, Katrin Petersen, sum frammanundan dró fullkomiliga skeiva niðurstøðu, sum hon so festi í samrøðuna.

Eg loyvi mær tí at endurgeva alt hetta innslagið. So kanst tú og ein og hvør annar lesa, hvat sagt varð og av hvørjum. Tað, sum Jóannes Eidesgaard segði, er skrivað við feitum:

– – –

*Yvirskrift tá „Dagur og vika“ byrjar:*

*”Moralurin hjá Tórbjørn*



*Jacobsen er avgerandi fyri, um hann skal leggja frá sær”, tað heldur Anfinn V. Hansen, advokatur.*

*Innleiðing:*

*”Tað er einans ein moralskur spurningur, um Tórbjørn Jacobsen eigur at fara frá”, sigur Anfinn V. Hansen, løgfrøðingur. Jóannes Eidesgaard heldur, at løgmaður einsamallur eigur at taka støðu til hetta málið, men hann væntar ikki, at løgmaður fer at taka støðu.*

*Innslag:*

*”Er tað ómoralskt at lata ein mann stýra landinum, tá ákæruvaldið ikki heldur hann klára at stýra einum skipi?”*

*”Tann spurningin mugu Tjóðveldisflokkurin og løgmaður taka støðu til. Ongar reglur eru at halda seg til, og tað er við vilja”, sigur ein løgfrøðingur, sum var við til at gera stýrisskipanarlógina.*

*Katrin Petersen (KP) fjølmiðlafólk: „Hví eru ongir reglar á hesum her økinum?“*

*Anfinn V. Hansen (AH): „Tað eru reglar á økinum fyri løgtingsmenn. Fyri landsstýrismenn er ikki neyðugt at hava reglar, tí spurningurin er, hvør skal avgera, hvat skal standa í reglunum. Vil mann ikki hava ein landsstýrismann at sita meir, jamen, so er so øgiliga lætt at fáa hann frá.“*

*KP: „Hetta er ein spurningur um moral og ikki um reglur, her mugu altso politikkarar royna at finna útav, hvat fólk flest halda er for galið, og hvat er fyrigeviligt?“*

*KP: „Hetta er simpulten ein spurningur um at hava følingvið moralinum í fólkinum?“*

*AH: „Ja, tað er spurningurin um at gera tað, sum fólk føla er rætt. Tað kann jú skifta frá samfelag til samfelag, frá tíð til tíð.“*

*KP: „Og tí heldur hesin løgfrøðingurin ikki, at tað ber til at samanbera hetta málið við eitt nú John Petersen — málið, tí tað var jú eitt rættiliga nógv øðrvísi lógarbrot. Men leiðarin í Javnaðarflokkinum vísur til júst hetta málið, tá hann skal siga sína hugsan.“*

*Jóannes Eidesgaard (JE):* ***„Je haldi, at Anfinn Kallsberg sum løgmaður eigur at taka støðu til, um hann heldur, hetta skal fáa avleiðingar ella ikki. Hinvegin aftur so vita okur tað, at okur hava havt eitt fordømi um tað sama - at ein landsstýrismaður hevur verið ákærdur uttan at verða rikin úr starvi, so at mann kann siga, at Anfinn Kallsberg hevur lagt eina linju, og tað er so hansara val.“***

*KP: „Hvørki løgfrøðingurin ella anstøðuleiðarin vilja siga, hvat teir høvdu gjørt, um trupulleikin hjá Tórbjørn Jacobsen var teirra trupulleiki. Men meðan løgfrøðingurin heldur, at fleiri instansir eiga at royna at finna moralsku balansuna, peikar Eidesgaard á ein persón.“*

*KP: „Tú vil ikki taka eina støðu um, hvat Tórbjørn Jacobsen átti at gjørt?“*

*JE:* ***„Nei, je haldi, at tað hevði verið skeivt av mær at sagt, hvat je hevði gjørt, um je var Anfinn Kallsberg. Je haldi, at Anfinn Kallsberg skal hava fullan og frían rætt til at taka ta avgerðina.“***

*KP: „Tú væntar altso ikki, at hann fer at gera nakað, eftirsum at hann ikki gjørdi nakað, tá John Petersen — málið var fyri?“*

*JE:* ***„Nei tað vildi verið løgið av Anfinn Kallsberg nú at víst konsekventheit, tí hann hevur ikki víst tað áðrenn.“***

– – –

Ein og hvør sær, at tað, sum Jóannes ger vart við, eru tvey viðurskifti.

- Annað er, at tað er løgmaður, sum einsamallur avger slík mál,
- og hitt er, at lítið talar fyri, at løgmaður fer at gera nakað sum helst, tí hann hevur longu lagt eina linju.

Út frá hesum kann hvørt mansbarn og fyrst av øllum mentamálaráðharrin lesa, at ákærurnar móti Jóannesi Eidesgaard hasari samrøðuni viðvíkjandi, eru púrasta burturvið.

Tað er týðuligt, at úttalilsini hjá Jóannesi hava minni áhuga, enn hungurin eftir at sleppa at spræna gor og gall á Javnaðarflokkin.

Tað kann gott vera, at tað í hesum sambandi hevur týdning fyri eina møguliga avgerð hjá løgmanni, at lønirnar hjá løgtingsmonnum og fólkatingsmonnum verða kunngjørdar. Lønirnar eru ásettar við lóg og atkomuligar hjá einum og hvørjum. Tað hevði tí óivað verið betri fyri trúvirðið hjá mentamálaráðharranum, at tú las lógirnar rætt og kunngjørdi tey røttu tølini, tá tú helt tað hava týdning í sambandi við omanfyri endurgivnu samrøðuna í Degi og Viku.

Hvat sáttmálanum um føroyska málið viðvíkur, so kann eg bert vísa til tað, eg áður havi skrivað um hetta evnið. Tað hevði eisini tænt okkara mentamálaráðharra at sett seg inn í málsgongdina í hasum málinum.

Eisini sigur tú, Torbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri føroyinga, at tað er ein rár hending at síggja javnaðarmann, sum hevur hildið á trolnál, spaka ella hamara. Álvaratos, hetta er ikki tala, sum er sømilig fyri ein mann, sum hevur átikið sær uppgávuna at hava ábyrgd fyri føroyskari mentan. Við seinasta val vóru 6062 javnaðarfólk á vali, og man ikki harímillum onkur hava havt trolnál, spaka ella hamara í hond?

Nei, skyldmaðurin, nú mást tú taka teg saman og føra teg fram sum ein mentaðan mann. Tað ber ikki til at fuska við arbeiðnum í so týdningarmiklum starvi, sum Føroya løgmaður og Tjóðveldisflokkurin litu tær til.

**Hans Jørgensen**

# Tað ræður um at standa saman



Nú eg fekk eina áheitan um at stilla upp til býráðsvalið, helt eg tað vera í lagi. Tað er ikki bara at tosa í krókunum, men at gera seg galdandi.

Nú ágangurin er so stórur frá almennari síðu, ja tað er næstan ikki dagur at man ikki hoyrir tingmenn av tingsins røðarapalli grenja inn á Havnina um bæði eitt og annað. Eg haldi tað órættvíst, tí ræður um at standa saman, ikki tí, eg havi einki ímóti bygdafólki, tað er nú einaferð so at tað býr 1/3 av fólkinum í Havnini, okkara høvuðsstaðið.

Samferðslan er og verður nógv útbygd, so í komandi framtíð verður eingin trupulleiki at koyra og sigla til Havnar fyri at avgreiða síni ørðindi. William Heinesen tók til, at Havnin er verðsins nalvi, og tað er eingin ivi um tað, tí ræður um at mana alt hatta kjakið um almennar stovnar í jørðina ongantíð ov skjótt. Kollafjørður og Havnin leggja saman 1/1 — 2001, tað frøast vit um, tí Kollafjørður er ein tann besti fjørður í Føroyum. Har eru rættuliga góðir møguleikar til útbyggingar á landi og fram við landi, so her ræður um hjá T.K. at venda eyguni norðureftir. Her hugsi eg serliga um útbyggingar á havnalagnum. Javnaðarflokkurin fer ikki at gloyma tykkum har norðuri tað er púra vist, og vit ynskja tykkum at vera hjartaliga vælkomin í T.K.

Ringvegur út á Argir eigur at vera gjørdur, tá ið Marknagilsvegurin er liðugur, tí verandi farleið av Argjum til Havnar er ikki nøktandi, tí bæði á morgni og ávísar tíðir á degnum er ógvuliga trongligt.

Bátahylurin her á Argjum hevur ligið á hálvum gekki í nógv ár, eg meini arbeiðið má gerðast liðugt, so økið verður meiri vinarligt.Sum tað sær út í dag er tað ikki nøktandi.

Fótbóltsvøllurin er ikki heilt liðugur, har mangla ljós, og ikki at gloyma skýlið á vestursíðini, eg haldi ikki, at vit á Argjum skulu hava ein vøll, ið ikki stendur mát við teir í Gundadali.

Barnaansingin má fáast í rættlag, ongantíð ov skjótt, tí sum nú er, er støðan ótolandi. Hetta er eitt mál, ið Javnaðarflokkurin prioriterar rættuliga høgt. Javnaðarflokkurin hevur lagt málið fram um, at ár 2003 skuldi tørvurin á barnaansing verða nøktaður, men hetta uppskotið fekk ikki undirtøku í byráðnum, málið bleiv koyrt í nevnd og verður ikki tikið uppaftur fyrr enn komandi ár. Hetta er ógvuliga óheppið, tí samfelagið er soleiðis samansett, at bæði foreldrini mugu vera úti á arbeiðsmarknaðinum, fyri at fáa endarnar at røkka saman. Hugsi tykkum, um olja verður funnin, sum øll rokna við, tá kunnu hesi foreldur við góðari útbúgving ikki ganga heima og passa børn, tí tá verður brúk fyri teimum í hesi vinnu. Hetta er eitt av teimum málum, ið oljufeløgini prioritera rættuliga høgt, áðrenn tey velja sær eina oljuhavn.

Tí ræður um at velja javnaðarflokkin ella eitt av valevnunum á listanum.

**Sakaris Hansen,**
**valevni hjá javnaðarflokkinum til býráðsvalið**

## Hin tigandi bólkurin

**Eldrasambýlið**

Nógv verður tosað um hvat avrik er gjørt tey seinastu árini. Men hvat er hent við íbúðarspurninginum fyri tey eldru?

Einki er hent síðan Fólkaflokkurin misti sína ávirkan í býráðnum. Væl var komið áleiðis við hesum máli, men bleiv tað síðani lagt til viks og ongantíð tikið fram aftur.

Sjálvsagt mugu vit hugsa um barnaansing, men eitt líka álvarsligt og átrokandi mál er eldraansing. Her mugu vit taka og gera nakað munagott og tað hevur skund, tí nógv gomul eru í ringari støðu, teimum tørvar eina størri ansing enn hana, ið heimahjálpin kann geva, tað vil siga, at fólk eru um tey allan dagin. Teirra ansing krevur



eisini eina loysn beinanvegin.

**Páll Petersen,**
**býráðslimur,**
**valevni Fólkafloksins**



Viðmerkingar

# Kommunan er okkara heimabeiti – og eitt heimabeiti skal røkjast!

Borgarin skal kunna koma nærri at komununi.

Tað sæst av øllum brøgdum, at nógv brek eru at rætta her í kommununi. Øll vit uppstillaðu til býráðsvalið eru við at detta um beinini á hvørjum øðrum at vísa á alt, sum eigur at gerast, og sum skal gerast nógv betri og annarleiðis. Alt gott um tað. Soleiðis eigur tað eisini at vera.

Kommunan er borgarnir í henni, og í øllum hesum nýggju lyftum gloyma vit ofta, at tað eru allir borgarir, sum gera kommununa. Hon er sum eitt deiggj, sum skal eltast. Alt skal røkjast, einki skal misrøkjast.

Eg búgvi á Berjabrekku, og eri forkvinna í Eigarafelagnum Berjabrekka II. Her er eisini eigarafelag fyri Berjabrekku I. Og nú verður farið undir at byggja Berjabrekku III. Í løtuni eru umleið 100 húskir tilsamans heruppi.

Vit hava ávísar trupulleikar við kommunini her uppi hjá okkum, og eg havi skilt av øðrum eigarafelagum, at tey hava eisini líknandi trupulleikar. Sumt gongur hampuliga væl, annað gongur slettis ikki. Vit koma nakað áleiðis, og so stendur fast. T.d. hava vit í okkara eigarafelag ferð eftir ferð biðið býráðið um fund viðvíkjandi 3. byggistig, sum jú kemur at hoyra til sama umhvørvi sum vit, men tað gongur striltið. Tað eru hóast alt nógv, sum vit koma at hava til felags, men vit fáa bert at vita, at tá alt er komið meira áleiðis, skulu vit frætta. Men hví skulu vit ikki vera við í planleggingini? Tað eru vit, sum sita eftir við øllum skurðslunum eftir kreppuna og mistøkunum, sum gjørd vóru. Vit vildi so fegin, at Berjabrekkunar I og II tikin við uppá ráð og fingið fylgt við, so vit høvdu kunnað átala, tá vit sóu, at okkurt gekk av skriðini? Og komið við góðum ráðum!

Samskiftið millum borgara og kommunu er ikki nóg gott!

Her halda vit, at **Berjabrekka ongan góðan eigur í býráðnum.** Tann trupulleikan vil eg gjarna rætta. Tí stilli eg upp til býráðsval.

**Hanna Joensen**
**Valevni**
**Tjóðveldislistin**

## Barnaansingarpláss – ein rættur

At vaksa upp undir tryggum korum er ikki øllum givið. Vit hava sum samfelag eina ábyrgd at skapa best møguligar karmar fyri allar borgarar, har vit serliga hava tey í huga, ið ikki kunnu syrgja fyri sær sjálvum.

Hetta ger barnaansingina - ella mangulin uppá somu - til eina uppgávu, ið stórstur dentur skal leggjast á at fáa loysta.

Vit vilja virka fyri, at fleiri barnagarðar vera bygdir í komandi setu.

**Inga F. Hjallnafoss**
**Valevni hjá**
**Sjálvsstýrisflokkinum**



# Glopraregnið avleiðingar



Í 1999 brúktu vit nógvan pening til at umvæla og asfaltera okkar niðurslitnu vegir, og úrslitið vóru vit øll glað fyri. Ætlanin varð tí ikki at brúka so nógv til asfaltering í 2000, men heldur nýta peningin til aðrar ábøtur á vegakervinum.

Men hendan ætlan er nú skerd munandi sum ein avleiðing av glopraregninum tann 18. september, sum skolaði asfalt av gongubreytum og vegum, og breyt seg upp ígjøgnum vegir, har avvatningarrørini ikki megnaðu at svølgja, við tí avleiðing, at vit nú standa við einum neyðugum umvælingararbeiði, sum kemur at kosta kommununi minst 5 mill. kr.

Tílíkum kann ongin taka hædd fyri, og ongin peningur er avsettur á fíggjarætlanini hjá kommununi til umhvørvisvanlukkur. Men býráðið hevur tikið tað støðu, at býurin skal gerast aftur í sama stand, sum hann var í, áðrenn vanlukkuna, og hevur í hesum sambandi sent Føroya Landsstýri eitt skriv um stuðul. Enn er onki svar komið, men vónandi ganga teir umsókn okkara á møti.

Men tað sum kanska øll í býnum hava lagt merki til og ilskast inn á, er almenni standurin á okkara gongubreytum og tað av røttum. Gongubreytirnar eru – nógva stðani – beinleiðis hættisligar at ganga á, og hartil eru tær illa røktar.

Kommunan, SEV og Føroya Tele arbeiða við nýtímansgerð av gomlu leiðingunumí býnum. Hetta fer eisini illa við gongubreytunum. Tí verður nú kravt, at gongubreytin skal asfalterast aftur í fullari breidd, og ikki bert bøtt, tá grivið verður í hesari.

Ætlanin er, at gera nakað munagott við gongubreytirnar komandi ár. Hetta skal gerast við at seta eitt arbeiðslið, sum burturav skal arbeiða við at fáa gongubreytirnar í býnum gjørdar, so bæði illa gongd fólk og fólk við barnavognum kunnu ferðast uttan ampa.

Eisini er ætlanin, at arbeiðið við at gera rundkoyring við posthúsið, av álvara skal fara í gongd. Peningur er settur av til projekteringina.

Enn er langur vegur til vit kunnu siga, at vit eru nøgd við umstøðurnar á vegakervinum. Men við tí íløgukarmi, sum Landsstýrið hevur tillutað okkum, er ikki møguligt at seta meira ferð á. Men við eini miðvísari ætlan, koma vit eisini á mál til endan.

**Hergerð Joensen**
**Forkvinna í Teknisku**
**nevnd Klaksvíkar býráðs**

*Tíðindaskriv*

## 121.767 kr. til Skótahjálpina

Úrslitið av skótahjálpini, sum var í døgunum 23.-30. september í ár, var 121.767,30 kr.

Skótahjálpin takkar hjartaliga fyri stuðulin!

Soviposan, um kastað varð lut um leygarkvøldið 30. sept., vann ein skóti í Skótaliði Sigmund Brestissonar, Tórshavn.

Sum áður sagt frá stuðlar Skótahjálpin 2000 verkætlanini hjá Barnabata at geva út faldara um Barnatelefonina og verkætlanina um at útvega undirvísingarmiðlar til skúla í Kontoba í Etiopia.

Nevndin fyri Skótahjálpina fer á næsta fundi, fyrsta mikudag í novemb-er, at gera av, hvussu nógvur peningur verður latin hvørjari verkætlan, og hvussu stórur partur av innkomnu upphæddini skal verða settur í serliga hjálpargrunnin.

# Hvat er kreppa?



Tá eg havi valt at nevna varandi loysnir bæði innan barnaansing og eldrarøkt, so er tað tí, at nevniliga hesi bæði ø.kini hava staði sum nr. 1 hjá øllum flokkum, í tveimum teimum seinastu valstríðunum, og somuleiðis hesu ferð.

Tey seinastu fýra árini eru nakrar lagnur komnar fram í fjølmiðlarnar, har familjur hava verið í stórari kreppu, orsaka av, at ein hevur havt dement foreldur, ella nærmastu familju við hesum trupulleika, búgvandi heima. At ein ikki hevur vita nakran annan útveg, enn at fara í fjølmiðlarnar við síni neyð, vísir, hvussu stórur tørvurin er, bara á hesum økinum.

Tað finnast eisini nógv, ið hava foreldur, ella avvarðandi búgvandi heima, ella tey búgva í egnum húsum, men tó eru so mikið illa fyri, at tey fyri langari tíð síðani, áttu at havt fingið tilboð um pláss, á sambýli ella røktarheimi.

Hvat er so kreppa? Jú tá tú, eftir at hava gjørt alt tað tú kundi og so innast inni veit, at hvussu tú so roynir, so kann tú ikki bæði klára at passa arbeiði, heim, familju og eisini tann dementa ella røktarkrevjandi familjulimin.

Kreppa er eisini, tá tú við tínum dementa familjulimi, møguliga hevur verið uppi dag og nátt, tí tú veit, at viðkomandi t.d. er sera kroppsliga væl fyri, og tí kann finna uppá at fara út, allar tíðir á degnum. Tey ið koma út fyri hesum verða skjótt koyrd føst í sínari støðu.

Kreppa er eisini, tá tú skal til songar, og tú veit, at ein av tínum nærmastu, ið hevur t.d. ellisbrek og tí ikki kann klára seg sjálvan, møguliga liggur einsamallur í nátt, tí tað eru ongir aðrir møguleikar.

Kreppa er eisini, tá tú eftir at hava roynt alt títt besta, ikki kann fáa so mikið av avlastan, at tú hevur møguleika fyri, at kopla frá.

Líka mikið hvørji lyftir sitandi býráð kann geva á hesum økjum nú upp undir valið, so skert tað ikki burtur, at her er ov lítið komið burtur úr, í mun til tey lyftir, ið vóru givin, til seinasta býráðsval.

Sum valevni Sjálvstýrisfloksins til komandi býráðsval er hettar nøkur av mínum hjartamálum.

**Ása Olsen**


